Brandur Sandoy
løgtingsmaður

Nr. 87/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um útgjaldið til fiskimenn úr Trygdargrunninum, settur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS § 52a).

1. Er tað soleiðis, at minstaløn til fiskimenn, sum fiska á ytru leið, bara er 1/3 av 1100 kr/dag?

2. Hvørjar grundgevingar hevur Trygdargrunnurin fyri at gera hendan stóra munin á fiskimonnum, sum fiska á innaru og ytru leið?

3. Eru ætlanir um at hækka útgjaldið til fiskimenn, sum fiska á ytru leið?

Viðmerkingar:

Á heimasíðuni hjá Trygdargrunninum stendur at lesa, at:

"Minstaløn er galdandi frá tí degi farið verður, og til tann dagin komið verður aftur, tó ikki fleiri dagar enn brúktir eru sambært fiskidagaskipanini."

Sambært heimasíðuni er minstaløn 1100 kr/dag.
Skip hava møguleikan at fara á ytru leið at royna. Royna tey á innaru leið, telur hvør dagur, ið skipið fiskar, 1 fiskidag, meðan royna tey á ytru leið, kunnu tey royna 3 dagar, og telur hetta bara 1 fiskidag.
Sambært vegleiðingini á heimasíðuni hjá Trygdargrunninum eru tað brúktir dagar í fiskidaga-skipanini, ið er grundarlag fyri útgjaldinum til fiskimenn.
Hetta hevur við sær, at manningin við einum fiskiskipi, sum fer ein túr á ytru leið í 9 dagar fyri at spara fiskidagar og fyri at lætta um veiðitrýstið á innaru leið, fær bara minstuløn fyri 3 dagar, ella í mesta lagi 3300 kr. fyri 9 dagar í sjónum.
Tað tykist serstakliga órímiligt, at inntøkutrygdin hjá einum fiskimanni er knappar 370 kr/dag.
Tí verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum, ið varðar av Trygdargrunninum.

Á Løgtingi, 14. mai 2020

Brandur Sandoy